## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og útsynningi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrrapartin stormur av suðri og regn. Seinnapartin hvassur vindur ella skrið av útsynningi og ælingur, men onkur sólglotti. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fyrrapartin strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og regn. Seinnapartin upp í storm av útsynningi og ælingur. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin hvassur vindur av útsynningi og ælingur, sunnudagin minni vindur av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.

# Stuttleikaðu sær á Stuttleikum hjá Hvirluni

**STUTTLEIKIR**
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Sunnudagin var fyrsta almenna kappingin á nýggju Tórsbreyt í Havn. Tað var frælsa ítróttarfelagið, Hvirlan, sum skipaði fyri hesi kapping fyri børnum upp til 10 ár.

Øll, sum klárðu at gjøgnumføra 60 metra renning, longdarlop og bóltkast, fingu

Tórsbreyt varð tikin í nýtslu leygardagin, tá stórt hátíðarhald var á breytini.

Fyri at kunna hava Tórsvøllin við sínum fullkomnu umstøðum, valdi Hvirlan at hava sítt tiltak sunnudagin, tó hópur av børnum møttu til leikirnar, sum vóru frá kl. 14 til 16.

Leikirnir vóru ætlaðir sum lítil sýnisgluggi til tað, vit kunnu íðka, tá vit frælsast. Eisini var endamálið at vísa vøllirnar fram, tá nógv virksemi er í gongd samstundis.

Leikirnir fyri børnini sunnudagin vóru skipaðir sum tríkampur, har hvør íðkari luttók í bóltkasti, longdarlopi og 60 m renning. Tíðir og longdir vórðu skrásettar á skreytblað, sum íðkarin fekk til tilmeldingina.

Tá hann hevði luttikið í øllum trimum greinum, fekk hann heiðursmerki fyri hetta.

Børnini stuttleikaðu sær óført, og dagurin vísti, hvussu hentir hesir vøllir eru – og gav eina týðuliga ábending um, at hetta eru vøllir, sum fólkið fer at taka væl undir við – og sum fara at verða nógv nýttir.



*60 metur rennikappingin var ein av kappingunum á Tórsbreyt sunnudagin, har børnini stuttleikaðu sær óført á Stuttleikum, sum frælsa ítróttarfelagið, Hvirlan, skipaði fyri*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -1 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 12 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 11 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 17 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 19 |
| Paris | -- |
| Madrid | -- |
| Róm | 22 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 26 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 22 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 26 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | 35 |
| New York | 16 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 18 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 23 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 972 hPa. í útsynning úr Íslandi fer í landnyrðing og grynnist.



**Í dag:**
Lágtrýstið yvir Norður-Ísland fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið við Føroyar fer eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 2/10 kl. 06[00] – 3/10 06[00]. Hitin í gjár: 4,2°
Minsti hiti máldur í oktober: -4,0° - Mesti hiti máldur í oktober: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 5/10 kl. 06[00] – 6/10 06[00].
Avfallið higartil í oktober: 61 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

Alt um harmonikur



www.simme.eu

Lesið Sosialin

## VESTFALLSKYRRINDI

5. oktober Mánin longst frá jørðini
7. oktober Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. okt | 0:53 | 13:29 | - | 12:29 | 0:08 | 12:44 | 2:53 | 15:29 | 3:53 | 16:29 | 11:44 | - | 10:44 | 23:20 | 1:08 | 13:44 | 2:08 | 14:44 | 0:38 | 13:14 | 1:53 | 14:29 |
| 8. okt | 2:05 | 14:40 | 1:05 | 13:40 | 1:20 | 13:55 | 4:05 | 16:40 | 5:05 | 17:40 | 0:20 | 12:55 | 11:55 | - | 2:20 | 14:55 | 3:20 | 15:55 | 1:50 | 14:25 | 3:05 | 15:40 |
| 9. okt | 3:15 | 15:35 | 2:15 | 14:35 | 2:30 | 14:50 | 5:15 | 17:35 | 6:15 | 18:35 | 1:30 | 13:50 | 0:30 | 12:50 | 3:30 | 15:50 | 4:30 | 16:50 | 3:00 | 15:20 | 4:15 | 16:35 |
| 10. okt | 3:56 | 16:16 | 2:56 | 15:16 | 3:11 | 15:31 | 5:56 | 18:16 | 6:56 | 19:16 | 2:11 | 14:31 | 1:11 | 13:31 | 4:11 | 16:31 | 5:11 | 17:31 | 3:41 | 16:01 | 4:56 | 17:16 |
| 11. okt | 4:36 | 16:55 | 3:36 | 15:55 | 3:51 | 16:10 | 6:36 | 18:55 | 7:36 | 19:55 | 2:51 | 15:10 | 1:51 | 14:10 | 4:51 | 17:10 | 5:51 | 18:10 | 4:21 | 16:40 | 5:36 | 17:55 |